# Staðbundin vitan, lendisnýtsla og lendisplanlegging í Sandoyar sýslu.

## BuSK-verkætlanin

Hetta er stutt fyribils frágreiðing um BuSK granskingarverkætlanina, við denti á tann partin, sum hevur snúð seg um menning av talgildum planleggingarambоðum. BuSK stendur fyri *Building Shared Knowledge capital to support natural resource governance in the Northern Periphery* og verkætlanin snúði seg um, hvussu staðbundin vitan og staðbundin sjónarmið kunnu flættast inn og gerast galdandi í lendisplanlegging og í stýring av náttúrutilfeingi. Endamálið við BuSK var tí at menna planleggingarambоð, ið stuðla undir luttøku frá fólki á staðnum, soleiðis at staðbundin vitan verður tikin við í planleggingarmannagongdir og í stýring av náttúrutilfeingi og lendisnýtslu. Í føroyska partinum av kanningararbeiðnum vóru Sandoyggin og avbjóðingarnar við lendisnýtslu í Sandoyar sýslu nýtt sum granskingardømi. Sandoyar sýsla var mett at vera serliga áhugavert øki, tí lutfalsliga nógvur landbúnaður er, ferðavinnan er í vøkstri, og komandi tunnilin, ið fer at gera tað møguligt at koyra úr meginøkinum til Sandoyar, fer væntandi í stóran mun at broyta umstøðurnar í oynni.

## BuSK – Building Shared Knowledge

BuSK-verkætlanin snúði seg um staðbundið vitanartilfeingi og stýring av náttúrutilfeingi í útjaðaraøkjum í Arktis og útnorðri (sí https://www.luke.fi/busk/ ).

Endamálið við BuSK var at menna planleggingarambоð, ið stuðla undir luttøku frá fólki á staðnum, soleiðis at staðbundin vitan verður tikin við í planleggingarmannagongdir og í stýring av náttúrutilfeingi og lendisnýtslu.

BuSK-verkætlanin var fíggjað av sokallaða *Northern Periphery and Arctic Programme* (sí http://www.interreg-npa.eu/), og umframt Føroyar hava lærustovnar og aðrir áhugapartar úr Grønlandi, Íslandi, Noregi, Svøríki, Finnlandi og Írlandi verið við í hesi verkætlan.

## Hvat er staðbundin vitan?

Staðbundin, ella siðbundin vitan, er vitan um lendisnýtslu, mentan og umhvørvi, ið er ment yvir øldir gjøgnum royndir hjá fólki, ið hava búð í ávísum stað. Staðbundin vitan kann vera úrtøkilig, innlimað í søgu, siðir, arbeiðshættir og mannagongdir.

## Lendisnýtsla, nýggjar vinnur og staðbundin vitan

Ein av stóru avbjóðingunum í Sandoyar sýslu, eins og í øðrum útjaðaraøkjum í útnorðri, er fráflyting. Fráflyting úr útjaðaraøkjum hevur ymiskar orsøkir. Ein av hesum orsøkum er vantandi starvs- og vinnumøguleikar. Busk-verkætlanin legði tí dent á menning av burðardyggum vinnu- og búskaparmøguleikum í Sandoyar sýslu. Serliga var hugt at **ferðavinnu** og **landbúnaði,** tí at átøk innan hesar vinnur longu eru í gongd. Menning av ferðavinnu og landbúnaði hevur við sær broytingar í lendisnýtslu, og arbeiði við BuSK snúði seg í stóran mun um, hvussu ein slík menning kann fara fram, samstundis sum hóskandi atlit verða tikin til verandi lendisnýtslu.

## At savna og nýta staðbundna vitan til stuttskygd endamál og til langtíðar endamál

Kanningararbeiði snúði seg um, hvussu vitan um lendisnýtslu kann savnast, skrásetast og gerast sjónlig og harvið fáa størri leiklut í lendisplanlegging. Slík vitan fevnir um ítøkilig viðurskifti sum ognarviðurskifti og eyðsýnd vistfrøðilig, umhvørvislig, vinnulig og búskaparlig virði í lendinum, men eisini um úrtøkilig virði. Hesi virði eru ofta torfør at seta orð á og verða ikki vanliga avmerkt á kortum, men hava avgerandi týdning fyri trivnað, sjálvbjargni og mentanarligt støðufesti. Í longdini eru hesi virði tí av størsta týdningi.

### Hví er týdningarmikið at gera staðbundna vitan sjónliga?

Tí náttúrutilfeingi og -øki verða ofta fatað sum "tóm" og "virðisleys" av planleggingar-myndugleikum og fólki uttanífrá, um ikki virðini í teimum verða kortløgd og soleiðis gjørd sjónlig.

## PPGIS – luttakandi kortlegging

Hvussu kann staðbundin vitan skrásetast og kortleggjast? Vanligasti mátin hevur verið at serfrøðingar savna og skráseta staðbundna vitan. Mátin, ið BuSK toymið valdi at nýta, var "luttakandi kortlegging", tað vil siga eitt PPGIS (Public Participation Geographic Information System), har fólk sjálvi kunnu skráseta og kortleggja gjøgnum teldur, telefonir e.l. Eitt talgilt spurnablað við heitinum "Lendisnýtsla í Sandoyar sýslu" var gjørt. Henda tilgongd verður ofta nevnd borgaravísindi, tað vil siga at tað eru borgarar, ella fólk á staðnum sjálvi, ið savna og skráseta vitan, heldur enn at vitanin verður innsavnað og skrásett av serfrøðingum. Hugsanin við talgilda spurnablaðnum var at lata fólk á staðnum merkja og skráseta lendisnýtslu í eina talgilda kortskipan. Endamálið er at gera hesa vitan sjónliga og soleiðis betra um møguleikarnar at taka hana við í planleggingarmannagongdir, bæði í kommunuhøpi, vinnuhøpi og í landsplanlegging.

### Mentanarligt og lívfrøðiligt margfeldi - tvær síður av somu søk

Til ST-konvensjónina um lívfrøðiligt margfeldi hoyra sonevndu Akwé: Kon--leiðreglurnar. Hesar skulu tryggja, at staðbundin vitan og sjónarmið verða tikin við í lendisplanlegging, tí staðbundin vitan tryggjar størri lívfrøðiligt margfeldi, bæði innan landbúnað og í náttúruni. Mentanarligt og lívfrøðiligt margfeldi eru sostatt tvær síður av somu søk.

## Lendisnýtsla og vistskipanartænastur

Við PPGIS-spurnablaðnum um lendisnýtslu fingu fólk møguleika sjálvi at skráseta virði í lendinum, bæði virði ið kunnu sigast at vera til gagnnýtslu, so sum landbúnaður, veiða og ymist, sum verður hentað (ber, blómur og annað), og eisini mentanarlig virði. Slík virði verða eisini rópt vistskipanartænastur. Vitan um hesar vistskipanartænastur er ofta úrtøkilig og knýtt at staðbundnari vitan og fatan. Tí verða tey sjáldan tikin við í planleggingartilgongdir.

## Luttakandi kortlegging – nøkur úrslit

Í talgilda spurnablaðnum var møguleiki at merkja støð

1. ið verða gagnnýtt til framleiðslu ella veitan av vørum og tænastum av ymsum slag
2. ið hava serligan týdning; persónligan, søguligan o.s.fr. og
3. har trupulleikar eru við lendisnýtslu.

193 fólk svaraðu talgilda spurnablaðnum. 61% av merkingunum vóru av støðum, ið hava serligan týdning. Hesar merkingar síggjast við gulum á Mynd 1, og tær svara til tað, sum verður kallað mentanar-vistskipanartænastur. 28% av merkingunum vóru støð, ið verða gagnnýtt, og kunnu bólkast sum veitanar-vistskipanartænastur. Hesi eru víst við bláum á Mynd 1. 86 merkingar á kortinum vóru støð, har mett var, at trupulleikar eru við lendisnýtslu.

| Virði | Merkingar | % |
|---|---|---|
| Støð, ið hava serligan týdning (Mentanar-vistskipanartænastur) | 472 | 61 |
| Støð, ið vera gagnnýtt (Veitanar-vistskipanartænastur) | 219 | 28 |
| Støð, har trupulleikar eru við lendisnýtslu | 86 | 11 |
| Tilsamans | 777 | 100 |




Mynd 1.

## Støð, ið vera gagnnýtt

219 merkingar vóru av støðum, ið verða gagnnýtt til djórahald, veiðu, og aðra framleiðslu; sokallaðar veitanar-vistskipanartænastur. Tað vil siga støð, ið hava búskaparligan týdning og virði. Her er umráðandi at skilja millum búskaparligan týdning og vinnuligan týdning, tí stór búskaparlig virði kunnu liggja í staðbundnari lendisnýtslu, hóast tey ikki eru vinnulig. Hesi virði vera tó ofta gloymd í lendisplanlegging, millum annað tí tey ikki verða skrásett.

## Støð, ið hava serligan týdning

Flest merkingar, 472, vóru av støðum, ið hava serligan týdning, tað vil siga merkingar, ið kunnu bólkast sum mentanar-vistskipanartænastur. Á kortinum var møguligt hjá fólki at merkja støð, ið hava serligt djóra- ella plantulív, mentanarligan, persónligan ella søguligan týdning, støð við serliga vøkrum útsýni og náttúru, og støð ið eru góð til spæl og útilív.

### Vistskipanartænastur

At varðveita lívfrøðiliga margfeldið er týdningarmikið, tí lívfrøðiliga margfeldið er grundleggjandi fortreyt fyri væl virkandi vistskipanartænastum. Ein vistskipanartænasta sipar til eina "vøru" ella "tænastu", ið vistskipanir "framleiða" til fólk og samfelag. Allar vørur og tænastur eru so ella so framleiddar av vistskipanum.

Vistskipanartænastur verða ofta bólkaðar í 4 bólkar:

1. Stuðuls-
2. Veitanar-
3. Stýrings-
4. Mentanar-

Á kortinum sæst, at stórt samanfall er millum støð, ið hava serligan mentanarligan og persónligan týdning fyri fólk, og støð ið verða gagnnýtt. Hetta merkir ikki einans, at somu støð veita fólki ymiskar tænastur, men eisini at fólk fáa tætt tilknýti til støð, ið tey gagnnýta. Staðbundin og siðbundin gagnnýtsla av lendi hevur tí stóran týdning bæði mentanarliga og fyri trivnað og støðufesti.

Flestar merkingar eru gjørdar í bygdunum ella í nánd av bygdunum. Fólk merkja sostatt oftast øki, ið tey hava beinleiðis tilknýti til við bústaði ella ættarsambandi. Harumframt er týðiligt, at ávís støð eru serliga týdningarmikil fyri trivnað, til dømis Mølheyggjar og Søltuvík.

Tann mest brúkta merkingin er "Gott til spæl og útilív". Hetta bendir á týdningin sum lendisnýtsla hevur fyri trivnað, serliga hjá børnum, og at fólk leggja stóran dent á hesi virði (sí Mynd 2).




Mynd 2.

## Trupulleikar við lendisnýtslu

Í talgilda spurnablaðnum var eisini møguleiki at merkja støð, har trupulleikar eru við lendisnýtslu, og 86 merkingar vórðu skrásettar. Ferðavinna (22%) var oftast nevnd sum ein trupulleiki, síðani seyður (13%), ATV akfør (13%), vinnuligt virksemi (9%), RIB-bátar (8%), og ymist annað (35%) Sí talvu. Annað, ið varð merkt í spurnablaðnum, vóru tóm hús/summarhúsabygging, at landbúnaðarjørð verður nýtt til bústaðarbygging, taðing og ovbit í haganum, dálking av ymsum slag og velting.

| Slag av trupulleika | % |
|---|---|
| Ferðavinna | 22 |
| Seyður | 13 |
| ATV | 13 |
| Vinnuligt virksemi | 9 |
| RIB-bátar | 8 |
| Ymist annað | 35 |
| Tilsamans | 100 |

Ferðavinna er sostatt tað slagið av trupulleika, sum oftast varð merkt í spurnablaðnum. Samstundis er væntandi, at ferðavinnan, og talið av ferðafólki fer at vaksa komandi árini. Sum heild kann sigast, at hesi tølini benda á, at tað er neyðugt at leggja stóran dent á at skipa vaksandi ferðavinnuna, við atliti til ymisku lendisáhugamálini og virðini. Seyður og onnur viðurskifti, sum eru tengd at landbúnaði, var tað slagi av trupulleika sum fekk næst flestar merkingar, og eisini her er neyðugt, at fólk, áhugabólkar og ymisk (virðis)sjónarmið verða tikin við í planlegging tíðliga í tilgongdini.

Her má tó havast í huga, at talgild kortlegging av hesum slagi er ein partslýsing av eini størri heild, og kann ikki standa einsamøll. Niðurstøður úr eini slíkari kanning mugu takast við hóskandi fyrivarni, og skulu heldur skiljast sum ábendingar um staðbundna vitan, fatanir og trupulleikar, og sum grundarlag og útgangsstøði fyri nærri kanningum. Samanumtikið er talgilda spurnablaðið eitt dømi um, hvussu myndugleikar, til dømis kommunur, og áhugabólkar, kunnu nýta talgild amboð til at økja um borgaraluttøkuna í sínum planleggingar-mannagongdum. Í hesum føri var PPGIS nýtt til luttakandi kortlegging av lendisnýtslu/vistskipanartænastum/trupulleikum í Sandoyar sýslu.

## Ferðavinna, landbúnaður og staðbundin vitan

Vinnulig nýskapan byggir oftast á verandi lendisnýtslu og virkandi vistskipanartænastur, og tí kann skráseting av hesum viðurskiftum vera við til at gera ymisk sjónarmið og ymisk áhugamál sjónlig. Í summum førum ber til at sameina ymisk sløg av lendisnýtslu í sama øki, og í øðrum førum troka nýggjar vinnur verandi búskaparligt virksemi burtur. Tí er týdningarmikið at hyggja at, hvørjum samfelagsbólkum broytta lendisnýtslan gagnar ella ikki gagnar, og hvørjir fyrimunir og vansar eru við broyttari lendisnýtslu og fyri hvønn.

# Ferðavinna

### At menna eina ferðavinnu, ið ikki órógvar í Sandoyar sýslu

Við tí fyri eyga at kanna hvussu talgild amboð kunnu nýtast í planlegging av burðardyggari ferðavinnu hevur samstarv verið millum BuSK og Visit Sandoy. Visit Sandoy hevur í sínum menningararbeiði lagt dent á, at ein vaksandi ferðavinna má skipast soleiðis, at hon tekur størst møgulig atlit til verandi lendisnýtslu, og at ágóðar av ferðavinnuni í økinum í størst møguligan mun gagna á staðnum. Partur av kanningararbeiðnum var sostatt at royna, hvussu ymisk vitan kann fáast til vega og nýtast til at skipa eina burðardygga ferðavinnu, til dømis hvussu gongutúrar til ferðafólk kunnu og eiga at skipast heilt ítøkiliga.

Ymiskar tilgongdir vóru nýttar at savna tilfar, millum annað samrøður, luttakandi kortlegging og áhugapartsfundir. Eisini var viðkomandi tilfar av ymsum slag, sum frammanundan er skrásett, savnað í talgildar kortskipanir ella GIS (geografiskar informatiónsskipanir).

#### Kortskipanir og planlegging

Kortskipanir eru vælegnað amboð at savna, goyma, viðgera og vísa viðkomandi tilfar og skrásettar upplýsingar. Somuleiðis kunnu kort vera eitt munagott amboð til at stýra, hvussu til dømis ferðafólk, sum ikki eru staðkend, ferðast í lendinum.

### Trupulleikar við ferðavinnu og rættindum at reika

Vaksandi talið av ferðafólki, ið kemur til Føroya, hevur havt við sær ávísar trupulleikar í mun til lendisnýtsluna, eisini tí at ov fá atlit hava verið tikin til fólk á staðnum, har ferðavinnan hevur vaksandi ávirkan, og til staðbundna vitan. Hesir trupulleikar koma nú til sjóndar ymsastaðni í landinum, har ósemjur eru um, hvussu atgongd í bø og haga skal skipast. Ein av stóru avbjóðingunum í Føroyum júst nú í mun til ferðavinnu og annað frítíðarvirksemi er atgongdin til uttangarðsjørðina. Eisini eru dømi um, at útlendskar ferðastovur selja gongutúrar í Føroyum uttan um føroyskar aktørar ella fólk á staðnum, og tí er neyðugt at finna loysnir og fáa samskipað hetta økið betur. Eitt avgerandi mál er at fáa skipaðar tænastur til ferðafólk, soleiðis at okkurt er at bjóða teimum, sum koma, og at hetta verður gjørt soleiðis, at møguligir ágóðar av ferðavinnu gagna á staðnum. Flestu ferðafólkini, ið koma til Føroya, vilja uppliva føroyska náttúru, og tað er eisini náttúran ið verður nýtt sum vørumerki at selja Føroyar sum ferðaland. Uttangarðsjørðin í Føroyum verður tó frammanundan nýtt til búskaparlig endamál, fyrst og fremst til seyð, men eisini onnur lendisnýtsla og virði eru í uttangarðsjørðini, sum ofta verða gloymd. Tað er í løtuni ógreitt, hvussu hevdbundin siðvenja viðvíkjandi frælsi at reika og ferðast skal, kann og eigur at skipast í Føroyum, serliga í sambandi við ferðavinnu. Og møguliga er eisini neyðugt við ymiskum loysnum ymsastaðni í landinum.

#### Trupulleikar av ferðavinnu í Sandoyar sýslu

Í Sandoyar sýslu týða kanningarnar, sum eru gjørdar í BuSK-verkætlanini á, at fólk á staðnum meta, at trupulleikar eru við ferðavinnu, men lutfalsliga eru teir ikki stórir enn. Tó er lætt at ímynda sær, at hesir trupulleikar gerast størri og vanligari, serliga tá Sandoyartunnilin fer at gera ferðasambandið munandi lættari og skjótari, og fer at taka avmarkingina í ferðafólkatali, sum nú er við ferjusambandinum, burtur.

## At savna viðkomandi vitan í planlegging av ferðavinnu

Á Mynd 3 síggjast hagakort og skrásettu bygdagøturnar, har fólk hava rætt at ganga. Eisini eru upplýsingar um ferðavinnutúrar, sum eru fingnar frá Pól Sundskarð. Mynd 3 og 4 eru dømi um, hvussu ymsar upplýsingar um gonguleiðir, skelti og annað kunnu skrásetast í kortskipanum.



Mynd 3.

Kortini ítøkiliggera hvussu ymiskir møguleikar eru at skipa túrar til ferðafólk, og at hetta longu verður gjørt. Tað er kortini ynskiligt at tað eru fólk og myndugleikar á staðnum sum avgera hvussu hetta økið skal skipast, og fyri trivnaðin er neyðugt at fólk og áhugabólkar á staðnum verða tikin við. Ein týdningarmikil áhugabólkur í hesum føri er tey, sum eiga og varða av jørðini. Tí skipaðu Visit Sandoy og BuSK hin 5. juli 2018 fyri áhugapartsfundi í Skálavík við heitinum "Ein ferðavinna, ið ikki órógvar", har hagastýrini í Sandoyar sýslu vóru boðin at luttaka. Á fundinum varð kjakast um, hvørjir trupulleikar og møguleikar eru við ferðavinnu fyri tey, sum varða av lendinum.[1]



Mynd 4.

## Áhugapartsfundur

Á fundinum var greitt, at umstøðurnar í ymsu høgunum eru ógvuliga ymiskar, og tí bar ikki til at koma til einfaldar loysnir.

Eisini var greitt, at tað er neyðugt við ymiskum bólkingum av gonguleiðum. Summastaðni er til dømis lætt og gott at ganga uttan ferðaleiðara, meðan summar av bygdagøtunum kunnu vera hættisligar, um fólk ikki eru staðkend. Mynd 4 er úrslit av tí, sum kom fram á fundinum, og fýra bólkingar av gonguleiðum eru teknaðar á kortið. Hetta kortið (Mynd 4) er ikki fullfíggjað, men kann lesast sum dømi um, hvørjir møguleikar eru at gera eitt slíkt kort við fullfíggjaðum upplýsingum.

[1] Ein samandráttur av tí, sum kom fram á fundinum kann lesast í frágreiðing frá Visit Sandoy (Tordis Kristina á Rógvi Simonsen, 6. august 2018).

## Ferðavinna og trupulleikar við lendisnýtslu

Sum nevnt er ferðavinna ein vinna í stórum vøkstri, og hetta hevur sjálvsagt trupulleikar við sær, eisini í Føroyum. Um hesir trupulleikar ikki skulu gerast ov stórir, er neyðugt onkursvegna at taka áhugabólkar og fólk á staðnum við í planlegging av ferðavinnu í størri mun, enn tað higartil hevur verið lagt upp til frá politiskari og almennari síðu. Millum annað ber til at økja um borgaraluttøku við talgildum spurnabløðum (PPGIS) og við luttakandi kortlegging, sum gjørt var í BuSK-verkætlanini.




Mynd 5. Vistskipanartænastur og støð, har fólk meta trupulleikar vera við ferðavinnu. Sum áður nevnt kunnu kanningar av hesum slagi bert nýtast sum ábending og sum útgangsstøði fyri nærri kanningum. Framferðarhátturin gevur tó fólki møguleika at luttaka í lendisplanlegging tíðliga í tilgongdini.

## At leggja ferðavinnu til rættis við kortskipanum

Tá arbeitt verður við kortskipanum, ber eisini til at draga inn ymsar upplýsingar og onnur sløg av vitan, sum longu er skrásett. Í ferðavinnuhøpi kundi til dømis verið viðkomandi at samanborið kortið við gonguleiðum og luttakandi skrásetingina av vistskipanartænastum við kortskráseting av fornminnum, sum Tjóðsavnið stendur fyri. (sí https://www.tjodsavnid.fo/jardfost-fornminni?rq=fornminni)[2]




Mynd 6. Skráseting av fornminnum (Tjóðsavnið)

Mynd 6 vísir kort yvir fornminni í skrásetingini hjá Tjóðsavninum. Við at nýta skrásetingina frá Tjóðsavninum ber til at síggja, hvørji fornminni eru í nánd av gonguleiðum, og hvørjar upplýsingar eru skrásettar um einstøku fornminnini. Henda skráseting er viðkomandi, bæði tí fornminni kunnu vera áhugaverd at vísa ferðafólki, og tí møguligt ferðavinnuvirksemi má leggjast til rættis við hóskandi atliti at fornminnum.




Mynd 7. Fornminni og gonguleiðir

Mynd 7 vísir, hvussu viðkomandi skrásettar upplýsingar, til dømis frá Tjóðsavninum, kunnu leggjast afturat einum korti við gonguleiðum. Soleiðis ber til at síggja hvussu gonguleiðir og gongutúrar til ferðafólk kunnu samskipast við upplivingum á leiðini.

[2] Her skal viðmerkjast, so sum upplýst verður á heimasíðuni hjá Tjóðsavninum, at skrásetingin av fornminnum er ein fyribils skráseting.

# Landbúnaður

Lutfalsliga nógvur landbúnaður er í Sandoynni, og fruktagóð sandmold og góð lendisviðurskifti eyðkenna oynna. Tað eru hesi eyðkenni, ið *Veltan* byggir á í sínum arbeiði við at menna bæði landbúnað í Føroyum og eitt vørumerki, ið kann skapa nýggjar framleiðslu- og arbeiðsmøguleikar. Hóast Veltan bara hevur fá ár á baki, eru úrslitini longu sjónlig.

## At menna burðardyggan landbúnað

Í teirri gongdini, sum er á veg við menning og nýskapan av føroyskum landbúnaði er neyðugt at hava í huga, at landbúnaður kann hava óhepnar avleiðingar fyri lívfrøðiligt og mentanarligt margfeldi, og harvið eisini á mentanarliga støðufestið í smásamfeløgum. Hinvegin kann landbúnaður eisini skipast soleiðis, at hann økir um lívfrøðiliga og mentanarliga margfeldið á staðnum, og økir um staðbundna matvøruframleiðslu, og búskapar- og vinnumøguleikar. Landbúnaður kann somuleiðis skipast soleiðis, at hann til dømis bindur CO2 og sostatt verður ein týdningarmikil vistskipanartænasta.

At menna burðardyggan landbúnað snýr seg í stóran mun um nýhugsan og nýskapan, men í líka stóran mun um virðing, nøktandi fatan av verandi lendisnýtslu og varðveitslu av verandi burðardyggum búskaparligum tilgongdum, sum eru rótfestar á staðnum. Tveir høvuðstættir, ið ofta verða nevndir í sambandi við burðardyggan landbúnað, eru 1) staðbundin framleiðsla, tað vil siga framleiðsla av landbúnaðarvørum til fólk á staðnum heldur enn til útflutnings, og 2) landbúnaður, ið leggur dent á at framleiða matvørur, ið liggja niðarlaga í føðiketuni til beinleiðis matna. Hetta er júst tað, sum áhugafelagið Veltan hevur lagt seg eftir, og av tí at virksemið í stóran mun byggir á ta vitan og tað tilfeingið, sum longu er á staðnum, kann Veltan síggjast sum eitt ítøkiligt dømi um nýskapan, ið byggir á og roynir at sameina staðbundna vitan og serfrøði av ymsum slagi.

### Lívfrøðiligt margfeldi, landbúnaður og staðbundin vitan

Tá tosað verður um lívfrøðiligt margfeldi, verður ofta bert hugsað um margfeldi í náttúruvistskipanum. Hetta er misvísandi, tí margfeldi í landbúnaðarskipanum er av sama týdningi.

FAO metir, at seinastu 100 árini er lívfrøðiliga margfeldið innan landbúnað minkað við umleið 75%.

Henda minking hongur saman við, at týdningurin av staðbundnum landbúnaði og staðbundnari vitan er minkaður.

### Staðbundin framleiðsla av landbúnaðarvørum - Møguleikar og avbjóðingar.

Føroysk landbúnaðarframleiðsla miðar sum er mest eftir kjøt- og mjólkarframleiðslu, meðan framleiðslan av vørum, ið liggja niðast í føðiketuni; grønmeti, korn og tílíkt, hevur verið lítil. Í dag verður lutfalsliga stórur partur av hesum matvørum innfluttur. Góðir møguleikar eru tí at økja grønmetisframleiðsluna.

Fyrimunir við at nýta geografisk planleggingaramboð í menningini av átøkum sum Veltuni og av landbúnaði sum heild eru eyðsýnd, tí landbúnaður er samanseting av ógvuliga nógvum og torskildum umstøðum, millum annað veðurlagi, vistfrøðiligum og evnafrøðiligum viðurskiftum. Serliga staðbundin landbúnaður krevur harumframt umfatandi vitan og royndir. Stórir møguleikar liggja í at savna, sameina og samansjóða ymsa viðkomandi vitan um staðbundna grønmetisframleiðslu, men avbjóðingar eru eisini í mun til hvussu vitanin verður brúkt og av hvørjum.

Talgilda kortleggingin av vistskipanartænastum í Sandoyar sýslu vísir at lendið veitir fólki á staðnum nógvar tænastur og stór virði, millum annað við landbúnaðarvirksemi. Arbeiði hjá Veltuni kann í stóran mun økja um hesi virði, og samstundis gera landbúnaðin meira fjøltáttaðan og margfeldan.

## Nýskapan innan landbúnað – møguleikar og avbjóðingar við lendisnýtslu

Staðbundin matvøruframleiðsla er av stórum týdningi; mentanarliga, umhvørvisliga, búskaparliga, og í mun til burðardygd og sjálvbjargni. Luttakandi PPGIS-skrásetingin kortleggur nakað av hesi framleiðslu, eisini ta framleiðsluna, ið ikki er beinleiðis vinnulig, men sum kortini hevur sjónligan búskaparligan týdning, og sum eigur at takast við í lendisplanlegging og nýskapan.

## Føroyskur landbúnaður og heimsmálini hjá ST

Hóast lendisnýtsla í Sandoyar sýslu kann tykjast fjarskotin frá heimsmálunum hjá ST so er tað júst í slíkum økjum at stórir møguleikar eru hjá Føroyum at gera nakað munagott fyri at røkka heimsmálunum. Matvørutrygd (food security) og matfullveldi (food sovereignty) eru eygsýniliga knýtt at staðbundnari lendisnýtslu, men eisini í aðrar mátar er neyðugt við framskygdum ætlanum fyri føroyska landbúnaðin. Um Føroyar til dømis skulu røkka málunum í París-avtaluni sum handla um binding av $CO_2$ úr atmosferuni, er burðardygg lendisnýtsla og landbúnaður ein avgerandi partur av loysnini.




Mynd 8

## Hvussu skal lendið nýtast í framtíðini?

Í Føroyum hevur gongdin verið, at lendisnýtslan er vorðin meira einsháttað, og bert lítil partur av lendinum verður nýttur til grønmetisframleiðslu. Samstundis er lendið, sum hóskar til slíka framleiðslu, ógvuliga avmarkað. Í mun til kjøt- og mjólkarframleiðslu krevur grønmetisframleiðsla tó minni øki. Á Mynd 8 er økið merkt (við grønum), sum var mett at vera hóskandi til vinnuliga grønmetisframleiðslu á Sandi. Framleiðsla av grønmeti og tílíkum matvørum hevði hugsandi økt um matvørutrygd og sjálvbjargni eins og lívfrøðiliga og mentanarliga margfeldið.